# Jákup vil aftur til USA

**Navn:** Jákup á Borg
**Bústaður:** Viljormsgøta 2 í Hoyvík
**Aldur:** 27
**Starv:** Stjóri í Bilrøkt
**Frítíðarítriv:** Familjan, fótbólturin og hundurin

Nær fært tú summarfrí í ár?
Vit skulu spæla Evropa Cup í fótbólti, og hetta liggur beint í summarfrítíðini, so har verður neyvan nøkur tíð til at halda summarfrítíð.

*Hvussu fert tú annars at halda summarfrítíðina?*
Eg eri akkurát fluttur inn í nýggj hús, so har er nokk at takast við.

*Plagar tú at ferðast uttanlands um summarið?*
Ja, vit hava verið næstan hvørt ár uttanlands. Vit vóru ein túr á Grand Canaria um heystið í fjør, og hetta ætli eg mær at royna aftur. Eg vænti tó at halda summarfrítíð í Føroyum í ár, men kanska eg fari uttanlands eftir fótbóltskappingina.

*Plagar tú at ferðast í Føroyum um summarið?*
Nei, eg ferðist alt ov lítið í Føroyum. Nú hevur man hoyrt so nógv um at ferðast í Føroyum í samband við SamVit, so hetta ætli eg at gera meir við.

*Hvat er títt dreymaferðamál?*
Einki slær eitt hotel sum Hilton í Keypmannahavn, so har fari eg altíð, um eg skal ferðast víðari. Annars var eg við landsliðnum í USA í fjør, og hetta dámdi mær ótrúliga væl. Har kundi eg gott hugsa mær at fari aftur.


*Jákup á Borg ætlar sær møguliga ein suðureftir við familjuni í heyst eftir fótbóltskappingina. Harafturat kundi hann hugsa sær at sloppið ein túr aftur til USA*




















